rulla so illa, at mong als ikki hætta sær hesa leið á vetrartíð, ella um tað bara er eitt lítið sindur at í sjónum. Harumframt er tað mangan trupult hjá Másanum at leggja at á verandi lendingum. Sjógvur skolar eisini ofta yvir kaiina, og tí mugu fólk passa sær løgir fyri at sleppa í land ella umborð. Hetta er ikki nakað, ið eggjar fólki nú á døgum at leita sær til Svínoyar, men hóast tað, so eru fleiri, ið trúliga vitja bygdina, og ber tað boð um, at Svínoy er eitt stað, tey eru góð við.

Onkur, ið kanska ikki kennir til viðurskiftini í Svínoy, spyr kanska, hví vit ynskja okkum tunnil, tá tað nú eru atløguviðurskiftini, ið eru ein forðan fyri einum góðum ferðasambandi til Svínoyar. Til tað kann eg siga, at Havnin á Svínoynni ikki er so løtt atkomilig frá bygdini av, tí neyðugt er at fara gjøgnum eina líð, og tað tekur umleið ein tíma at fara hagar til gongu. Tunnulin skal tí gerast fyri at fáa atgongd til Havnina, og er hetta tí ikki øðrvísi enn at gera ein veg millum bygdir. Tað verður bara hildið, at ein tunnil er besta loysnin, tí tað verður sera trupult at gera veg gjøgnum líðina.

Tað eru nú skjótt 30 ár síðani, svínoyingar fyrstu ferð bóru fram hetta ynski, so tað er als ikki talan um, at svínoyingar nú brádliga eisini eru farnir at tosa um tunnil. Heldur eru tað røddirnar aðrastaðni frá í landinum, ið eru komnar aftaná, men sum hóast tað kortini verða tiknar framum, so svínoyingar og onnur, ið ferðast hesa leið, mugu standa á síðulinjuni og hyggja at, meðan landið aðrastaðni verður uppaftur betri útbygt enn frammanundan. Tað er harmiligt, at Føroya Løgting drálar so leingi við at taka eina avgerð um hesa farleiðina til Svínoyar, tí tað er av alstórum týdningi fyri, at bygdin skal reisa seg aftur.

Nýtt løgting er nú valt og nýtt landstýri skipað. Nógv hevur verið tosað um at raðfesta tær íløgur, ið gerast skulu, yvir eitt langt áramál. Tað er kanska skilagott, men eg vil undirstrika her, at er tað nakar, ið hevur bíðað eftir, at Føroya Løgting fær í lag at taka eina avgerð um at bøta um samferðsluna í einum ávísum øki, so eru tað tey, ið ferðast leiðina til Svínoyar. Skulu íløgurnar til at bøta um sambandið til Svínoynna nú aftur skúgvast afturum í røðini, so er tað sum at fáa vátan vøtt í andlitið. Tað tykist tíverri sum um hugburðurin er tann, at alt annað aðrastaðni í landinum, har ferðasambandið frammanundan er fleiri øldir frammanfyri tað afturúrsiglda sambandið til Svínoyar, fyrst skal útbyggjast enn meira og so kanska, um vit tá hava hug og tíð og ikki longur hava brúk fyri pengum aðrastaðni, so skulu vit umhugsa at gera okkurt har úti í Svínoy. Er hetta leisturin fyri samferðsluútbyggingum í Føroyum, so verður drúgt hjá okkum í Svínoy at bíða, tí um alt fyrst skal vera gjørt fullkomið alla aðrastaðni, so koma vit at



bíða til dómadag – einki er so vist sum tað. (Tá eg sigi, tað verður drúgt, kann eg sjálvandi mistaka meg, tí eg veit ikki nær dómadagur verður.)

Eg vil tí heita á allar politikarar um at taka viðurskiftini viðvíkjandi samferðsluni til Svínoyar í størsta álvara og skunda undir at fáa framt tær neyðugu íløgurnar so skjótt sum gjørligt, so Svínoyggin framvegis kann vera ein virkin partur av føroyskari søgu og mentan og ikki bara nakað, sum vit kunnu lesa um í bókum.

- - - - -

Eg havi nú hug at venda aftur til okkara fólkakæra skald úr Havn. Mong løtan er farin við at reika í yrkingum hansara, har tað mangan kemur til sjóndar ein fløvandi alskur til alt, ið rørist í okkara lítla, men kortini fjølbroytna landi - bæði á bygd og í bý. Í seinastuni eru ódnir farnar um landið, so harðar sum sjáldan fyrr. Úr Skálavík fréttist frá stórum brimskaða, og í Gøtu leikaðu hvirlurnar í upp á tað harðasta, og vil eg nú tríva í aftur yrkingina, eg byrjaði við, har tað eisini er talan um ódnarveður, tó meiri enn bara á ein hátt. Eg síggi fyri mær ta ódn, ið leikaði á hjá einum gomlum gøtumanni á sinni, og gevi eg nú Áarstovuskaldinum orðið eina løtu:

*Sat gamalur í Gøtu,*
*so grátt var hár og skegg,*
*hann gekk sær eina løtu*
*út undir hallarvegg.*
*Alt fór at aftna dagur,*
*nærum var sólin sett.*
*Um firðir fuku glaður,*
*og loft var myrkareytt.*

*Hann hoyrdi íðu róta,*
*sá brim um Mjóvanes,*
*sá ódnarsjógvar bróta*
*og rennisúg um fles.*
*hamarsklettum høgu*
*hekk skaddan vát og grá,*
*bar vestan vetrarkvøðu*
*út yvir Gøtu vág.*

Ov drúgt verður at taka øll ørindini við, men soleiðis sær Hans Andrias fyri sær Gøtutrónda; henda gamla høvding, ið syrgir teir falnu gøtuskeggjar. Svárt kennist tað honum at verða svikin á ellisárum og ikki vera mentur at løna aftur tann nívandi loga, ið bylgist honum í barmi. Einaferð var hann mætur høvdingi við stórum valdi, men nú var eingin, ið vildi rætta honum hjálpandi hond. Í hesum viðfangi kann eg ikki lata vera við eisini at hugsa um móðurbróðir hansara, Svínoyarbjarna, ið sat sum høvdingi í Svínoy fyri meiri enn túsund árum síðani. Tað var hann, ið forðaði fyri, at Sigmundur og Tórur vórðu dripnir eftir orrustuna í Dímun.

Tá áttu svínoyingar eina rødd, ið hoyrdist og sum hevði makt og myndugleika, men nú tykjast teir gloymdir av øllum.

Tað myrknar í havsbrúnni, og eitt æl tekur leiðina inn eftir Svínoyarvík, men Dragin stendur enn líka reystur og letur seg ikki vika av fótum, men herjar á illveðrið. Veður og vindur leika í, og brimdunið buldrar í homrum og fjøllum, men mangt eitt ælið hevur hesin kappi køvt og við treysti stígur hann út í brimið. Aldubrotini strúka honum hvít um hálsvølin, men hann letur ei á sær finnast. Hann er vorðin sáttur við náttúruna. Hetta er hansara stað. Her varð hann settur at standa í ódn sum í logn og bera merki svínoyinga bæði í viðgongd og mótburði, og nú tað dregur samanum, og eygað er um at missa hann burtur í sjóroki, vindi og regni, er tað, sum hoyri eg hann siga við meg, meðan hann stígur út í ódnarveðrið og tað uppøsta Atlantshav, berandi á barmi hvítan sjógv og skúmandi aldubrot: "Ja, har ganga tey, ið valdið hava, á teimum bonaðu gólvunum suðuri í Havn. Sig mær! Munnu tey vita, hvat tað veruliga merkir fyri svínoyingar, at teir hava tokka til heimstaðin, men eingin ønir teimum aftur? - Vónandi glógvar tað tó í onkrum. – Skriva tú; eg skal taka mær av illveðrinum."



